# Ferðabræv úr New York

**Kári P. Højgaard, tingmaður Sjálvstýrisfloksins, er á ST aðalfundinum í New York saman við donsku sendinevndini**

FERÐABRÆV
*Kari P. Højgaard*
*New York*

Nú hava vit verið her eina viku og hevur hon verið hendingarík. Vit møta hvønn morgun a donsku missiónini, har gjøgnumgongd verður av øllum, sum hendur og viðkemur teimum nevndum og ráðum, ið eru viðkomandi fyri donsku nevndina.

Alt er fleiri ferðir størri, enn ein er vanur við heimanífrá, eisini prísirnir, men her er almikið at síggja og uppliva. Nú hava teir helst ikki postboð við somu servicu, sum vit kenna tað heima í Føroyum, men tað má vera trupult at avgreiða post, tá húsini eru frá 20 til yvir hundrað hæddir.


*Okkara maður í New York hevur politieskortu*

Sunnudagin vóru vit ein túr í Harlem til eina guðstænastu hja Firsth Corinthian Baptist Church. Henda guðstænastan var ikki tað, ein afturhaldandi kirkju- og missiónsmaður úr Føroyum er vanur við, men var hetta eitt ríkt upplivilsi. Tvær innsavningar, klappan, sangur og talur, bøn og forbøn, sum vardi í samfullar tríggjar tímar. Ein sera góður andi var til staðar, og kom eg at hugsa um orðini ur halgubók:

»Eg havi eisini aðrar seyðir, sum ikki hoyra upp í hetta fylgið. Eisini teir eigi eg at røkta.«

Hugsaði eisini um, hvussu okkara hirðar heima kundi fingið íblástur av sanginum og talunum, sum vóru nakað heilt fyri seg, og har orð og sangur vórðu framførd við likamsrørslum, sum gjørdu boðskapin viðkomandi og livandi.

Ein dagin vóru vit niðri við World Trade Center. Har er ikki nógv eftir av Twin Tower, og rýkur framvegis úr leivdinum. Ófatiligt at hugsa sær, at ímyndin og stoltleikin hja New York kundi verða jarðlagt eftir so stuttari tíð.

Tá vit gingu at lesa, lærdu vit sálmin »Kirkjan hon er eitt gamalt hús, stendur um tornini falla. Torn sukku eftir torn í grús, klokkur enn kima og kalla.«

Hesi orðini komu mær til hugs, tá ein sá hesa syrgiligu sjón og øll fólkini, sum stóðu vid sorg og hugdu at.

Lyklaorðið er: » Á Guð vit líta, saman vit standa.« Hetta orðið er prentað ymsastaðni og er drívkraftin til at koma víðari.

Allastaðni veitrar tað amerikanska flaggið, og hevur hendingin 11. september verið vid til at knýta amerikansku tjóðina saman til eina eind.

Veðrið hevur verið gott, og kom hitin fyrstu 5 dagarnar upp í 20 til 23 hitastig vid sól og klárum himli. Tað er framvegis klárt og gott veður, men nakað kaldari.

# Brak í SMS

**Fríggjadagin eru 24 ár liðin síðani SMS lat dyrnar upp á fyrsta sinni. Í hesum sambandi er stórt føðingardagstiltak á skránni**

FØÐINGARDAGUR
*Turið Kjølbro*

Føðingardagurin hjá SMS verður vanliga hátíðarhildin við nógvum tiltøkum, í ár er einki undantak, og tað eru serliga børnini og teim ungu, tiltøkini eru ætlað. Tiltøkini byrja longu í dag kl. 15.00, tá ið Ung Stjørnuskot syngja og spæla á pallinum, sum er settur upp á Torginum. Ung Stjørnuskot er eitt rútmiskt kór við ungum millum 10 og 14 ár. Sigrid Sivertsen, sanglærari, hevur ábyrgdina av kórinum. Tey hava áður framført, eitt nú í Norðurlandahúsinum, á kvøldskúlaframsýningu m og í Grasagarði.

Fríggjadagin verður so stóra føðingardagsveitslan. Byrjað verður kl. 10.30, tá ið øll kunnu fáa sær kakao, køkur og Pop Top frá MBM. Eisini eru ballónir til børnini. Kl. 11.00 undirhalda Angela úr sjónvarpssendingini Fres, klovnurin, Hannibal og búktalarin Absalon við sínum dukkudreingjum, Nikláa og Korneliusi á pallinum. Seinnapartin kl. 16.00 eru tey øll aftur á pallinum. Tá fáa børnini ballónir.

Leygardagin heldur føðingardagstiltakið fram. Kl. 14.00 er undirhald á pallinum við Angelu úr sjónvarpssendingini Fres og klovnunum, Hannibali, Fjotta og Bobo. Aftur hesa ferð fáa vitjandi børn ballónir. Fjotti og Bobo er kendir fyri síni fjølbroyttu gandakynstur og sín sang. Og so duga teir eisini væl at gera ballónskapilsi. Kl. 16.00 hava Trølla-Pætur og Trølla-Omman rokkkonsert á pallinum. Aftur at sær hava tey bæði tær fýra fittu dansandi fjørugenturnar. Tær fýra hava ikki áður verið á palli við Trølla-Pæturi og Ommuni, men tær lova eina framførslu við kendum løgum og nógvum futti í.

# Operatión Dagsverk



HJÁLPIARBEIÐI
*Ingrid Bjarnastein*

Aftur í ár, eins og undanfarin ár verður skipað fyri hjálpiarbeiði á Studentaskúlanum í Havn. Føroya Studentaskúla og HF-skeið skipar í samarbeiði við HTX í Klaksvík fyri tiltakinum Operatión Dagsverk.

Talan er um hjálpiarbeiði, har næmingarnir á skúlanum fara út at arbeiða í ein dag ístaðin fyri vanliga skúlagongd. Ætlanin er, at teir skulu út at arbeiða hjá onkrari fyritøku, handli ella líknandi, og síðani lata peningin til Operatión Dagsverk, sum síðani sendir innsavnaða peningin víðari eitt hvørt hjálpiarbeiði. Í ár fer stuðulin til indianarabørnini í Chiapas í Mexico. Peningurin skal stuðla útbúgvingarmøguleikunum hjá indianarabørnunum, tí nógv av teimum hava ikki møguleika at ganga í skúla, tí tey búgva so langt frá stórbýnum.

Næmingarnir skulu arbeiða í mesta lagi í átta tímar fyri minst 250 krónur. Hesin peningurin kann dragast frá í skatti.

Studentaskúlin og HF-skeiðið í Eysturoynni ætlar sær eisini at vera við í ár. Á studentaskúlanum í Havn søgdu tey, at tey hava teirra egnu verkætlan viðvíkjandi Operation Dagsverk. Næstformaðurin í næmingaráðnum á studentaskúlanum á Kambsdali, Birgar Larsen, sigur, at studentaskúlin á Kambsdali ætlar sær eisini at vera við í ár, men tey hava ikki fingið nakað at vita um hetta. Tey ætla at stovna eina Operatión Dagsverk nevnd, men um tað ikki eydnast teimum at vera við at savna pening til indianarabørnini í Mexico, verður helst skipað fyri øðrum hjálpiarbeiði eins og í fjør. Tað skulu nevniliga minsta lagi 80% av øllum næmingunum á skúlanum út at arbeiða. Men tað verður helst ikki nakar trupulleiki, sigur Birgar Larsen.

Um tað eru fyritøkur ella handlar, ið hava hug til at fáa næmingar at arbeiða fyri seg í ein dag kunnu tey seta seg í samband við Drós Djurhuus á telefon 250279 ella Sunnuva Bæk á telefon 258881 innan 5. november. Operatión Dagsverk-dagurin er settur at verða fríggjadagin tann 9. november. Eisini fólk, ið hava hug til at fáa onkran at arbeiða privat fyri seg kunnu seta seg í samband við Operatión Dagsverk-bólkin.



Brúkarin

Nr. 110 • mikudagur • 31. oktober 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fryst grønmeti er gott


*Rigmor Dam*

Tað er ein krøna at fryst grønmeti er ósunnari enn frískt. Hetta er kanska eisini ein umbering fyri ikki at eta meira grønmeti.

Ein kanning frá Sønderborg, har 498 tilvildarliga útvald fólk vórðu spurd, vísti at 80 prosent hildu, at frískt grønmeti er sunnari enn fryst. Einans 14 prosent hildu, at fryst grønmeti er eins gott og frískt.

Matarserfrøðingurin hjá danska brúkarastovninum Forbrugerinformation, Gitte Laub Hansen, sigur, at tá talan er um heilt nýupptikið grønmeti, sum verður gjørt til á rættan hátt, er tað sunnari enn tað frysta. Men so er ikki, tá grønmeti er uttanfyri sesong, verður goymt í fleiri mánaðir eftir at tað er fingið til høldar, verður flutt langa leiðir, og liggur og følnar fleiri dagar í grønmetisskuffuni, áðrenn tað verður kókað sundur. Í hesum førum er frysta grønmetið bæði betur og vitaminríkari.

## Mikroovnur eisini góður

Kanningin, sum danska átakið »6 om dagen« hevur gjørt, vísir eisini, at fólk sum heild eru ótrygg við at tilgera grønmeti í mikroovni. 48 prosent av teimum spurdu hildu, at tað er betur at kóka grønmeti í eini grýtu enn at gera tað til í mikroovninum. Hesum vóru 27 prosent ikki samd við.

– Tað er ikki so, at tað er betur at kóka grønmeti í grýtu enn í mikroovninum, sigur Gitte Laub Hansen. Tvørturímóti er mangan skynsamari at gera grønmeti til í mikroovni. Tapið av vitaminum er treytað av kókitíðini, hitanum, nøgdini av vatni og súrevni, og hvussu fínt grønmetið er sundurskorið. Flestu vitaminirnar fara til spillis, tá ið grønmeti verður hitað ov leingi upp, í ov nógvum vatni, og við ongum loki; og tá ið grønmeti er smátt sundurskorið, sigur hon.

## Vitaminir í skalinum

Ein onnur leysasøga um frukt og grønmeti er, at vitaminirnar eru í skalinum. Í kanningini frá Sønderborg søgdu 74 prosent av teimum spurdu, at vitaminirnar eru í skalinum. 14 prosent søgdu seg verða ósamd.

– Tað er ikki so, at allar vitaminirnar eru í skalinum. Vitaminir eru í allari fruktini ella grønmetinum. Um vit til dømis taka eina sitrusfrukt, so eta vit ikki skalið. Harafturímóti eru nakað fleiri vitaminir í skalinum á súreplum, sigur Gitte Laub Hansen.

## Ókókað grønmeti

Eitt annað, sum fleiri ímynda sær er, at rátt grønmeti er sunnari enn kókað. Hetta hildu 79 prosent av teimum spurdu í kanningini, meðan 13 prosent vóru ósamd. Sannleikin er kortini tann, at tað loysir seg ikki at eta rátt grønmeti í staðin fyri kókað, heldur Gitte Laub Hansen, og greiðir frá,

– Rátt grønmeti fyllir meira og er tí drúgvari at seta til lívs. Kókað grønmeti er leskiligari og fyllir ikki so nógv. Tað krevur ikki so nógv at eta tað, og tí eta vit størri mongdir av kókaðum grønmeti. Hetta bøtir um vitaminmissin, av at grønmeti verður kókað.

## Dósafrukt ikki so galin

Spurt varð eisini hvat fólk hildu um frukt í dós. Til hetta søgdu 22 prosent at ongar vitaminir eru í dósafrukt; 50 prosent at vitaminir eru í og 28 prosent svaraðu, at tey ikki vistu.

– Vitaminir eru í dósafrukt. Men færri enn í fríska frukt. Til dømis lækkar innihaldið av C-vitamin í anaRignas og fersku niður í eina helvt, tá fruktin verður goymd í dósum. Kortini eru virðismikil føðsluevni eftir í fruktini, sum er lættari at eta hjá summum, sigur Gitte Laub Hansen at enda.




# Føroyskur brúkarastovnur setast á stovn

Tað hevur leingi verið greitt, at áhugamálini hjá brúkarunum eru sera illa vard í Føroyum. Eru trupulleikar, stendur brúkarin bæði ráðaleysur og verjuleysur, sigur Javnaðarflokkurin, sum í næstum fer at leggja uppskot fram, um at seta á stovn føroyskan brúkarastovn.

Vit hoyra nærum hvønn dag fjølmiðlarnar umrøða ymiskt frá brúkarastovnum í grannalondum okkara. Tað verið seg ávaringar um heilsuskaðiligar ella vandamiklar vørur, upplýsingar um tele-, tryggingar ella peningaøki, kanningar av barnaútgerð ella hvítvørum, og vanliga kanningar um kost og heilsu.

Men í Føroyum er ongin almennur brúkarapolitikkur, tað er ongin skipað brúkarakunning, og brúkarin hevur ongastaðni at leita sær hjálp, um hann heldur seg vera fyri órætti. Hetta sigur Javnaðarflokkurin í álitinum um brúkarapolitikk og brúkarastovn, sum er sent til hoyringar. Eftir møguligar rættingar verða lóg um marknaðarføring og lóg um brúkarakærunevnd lagdar fyri løgtingið seinni í heyst.

### Politiskt ábyrgdarøki

Tað tykist í dag sum ein sjálvfylgja, at brúkaraáhugamál eiga at røkjast sum eitt politiskt ábyrgdarøki. Royndirnar her heima og í grannalondum okkara siga okkum tað sama.

Brúkaraáhugamál í okkara brúkarasamfelag eru av stórum samfelagsligum týdningi og raka okkum øll og alt tilfeingi okkara, sigur flokkurin í álitinum. Tí kunnu hesi mál ikki einans røkjast á privatum grundarlagi, men eigur politisk ábyrgd eisini at vera.

Ein góður almennur brúkarapolitikkur hevur ein virknan brúkara sum fortreyt, og í hesum sambandi er upplýsingarvirksemið eitt týdningarmikið amboð. Tí eiga uppgávurnar hjá stovninum at vera fjølbroyttar og millum annað at fevna um eina kunningardeild við bløðvirksemi og heimasíðu. Harumframt skal peningur og orka setast av til kanningarvirksemi, til at samanbera dygd og prísir, og annars at gera kanningar um vørur og tænastur.

### Grannalondini langt frammanfyri

Umframt at brúkaraáhugamál verða umboða í ymsum altjóða felagsskapum, hava grannalond okkara eisini sett á stovn brúkarastovnar beinleiðis í miðfyrisitingini. Knýtt at hesum stovnum við felags skrivstovu eru Brúkaraumboð og Brúkarakærunevnd, sum virka óheft av miðfyrisitingini. Danmark, Svøríki, Noregi og Finnland hava øll skipað seg á henda hátt. Ísland hevur tó enn ikki fingið eitt brúkaraumboð og heldur ikki eina almenna kærunevnd. Í Føroyum høvdu vit eina ferð eitt brúkarafelag, men millum annað orsakað av tørvandi fíggjarorku, varð hetta niðurlagt í 1992.

### Bygnaður

Javnaðarflokkurin skjýtur upp at brúkarastovnur, brúkaranevnd, brúkaraumboð og brúkarakærunevnd øll eiga at samansjóast í eina eind, so tað verða tey somu fólkini, sum í mest møguligan mun taka sær av øllum. Hetta hækkar fakliga kunnleikastigið, gevur bestu tænastuna og gevur bestu úrtøkuna av almennu íløguni.

Og fyri at brúkarin og vinnan í mest møguligan mun greiðir viðurskiftini sínamillum, verður dentur lagdur á at vinna og brúkari eru javnt umboðað í teimum nevndum, sum settar verða, sigur Javnaðarflokkurin í álitinum.